## Vitan á skák í SMS

Spennandi granskingardagar fyri alla familjuna verða í SMS í morgin, fríggjadagin og leygardagin. Har verða framsýningar: Tekningar frá kappingini Tekna ein granskara, Aktuellar granskingarverkætlanir og Almenn kunning um gransking. Eisini verða tiltøk so sum at granskarar hava stuttar framløgur um sína gransking, uppgávur og kappingar fyri børn og ung – vinningar verða gávukort úr Rit & Rák, møguleiki at royna ymisk granskingaramboð og lutir, bólkurin Pixel málar sítt boð uppá føroyska granskaran 2010. Kaffi- og saftkrókur við bløðum um gransking til børn og vaksin og eisini er teknikrókur fyri børn. Til ber at lesa meira um skránna á HYPERLINK "http://www.gransking.fo" www.gransking.fo




# Føroyskur orkudepil størstu sólorkuskipan í Norðuratlantshavi

**Bæði sólorkuparturin og vetnisparturin gera Kambsdal til nakað serstakt innan varandi orkukeldur. - Millumtjóða samstarv er ein týðandi partur av hesum arbeiði fyri at fáa íblástur og góðar samstarvsfelagar. Hetta er ein verkætlan, sum kemur at menna okkara vinnumøguleikar og sum eisini fer at selja okkum sum ferðamannaland, sigur Eyðun Lauritsen um orkudepilin á Kambsdali**

ORKUDEPIL
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Eyðun Lauritsen, sum er ein av pørtunum aftanfyri orkudepilin á Kambsdali, hevur sent okkum nakrar reglur um depilin, sum vit í hesi grein fara at lýsa í stuttum.

Orkudepilin á Kambsdali hevur til endamáls at skapa fyritreytir fyri varandi orkuloysnum.

- Hetta gerst við at vísa á tøkniloysnir og at kanna hesar í samstarvi við granskarar. Uppgávan er eisini at finna útav, hvussu loysnirnar kunnu betrast, eins og uppgávan er at kunna almenning, handverkarar, fíggingarstovnar, myndugleikar og onnur um hesar loysnir. Millumtjóða samstarv er ein týðandi partur av hesum arbeiði fyri at fáa íblástur og góðar samstarvsfelagar.

Eyðun Lauritsen sigur, at samlaða verkætlanin á Kambsdali tekur støði í, at vit búgva í Føroyum, og tí er hetta ein føroysk loysn bygd upp við altjóða samstarvi.

Hetta er ein loysn, sum eisini kemur at menna okkara vinnumøguleikar og selja okkum sum ferðamannaland, tí Kambsdalur verður kendur úti í heimi, leggur hann aftrat.

### Hvør er tøknin?

Í dag fevnir orkudepilin um tvær vindmyllur, eina vetnisskipan við vetnisgerara (elektrolyzara), vetnisgoymslu, el-battaríir, brennikyknu og sólorkuskipan.

- Við hesum hevur skipanum nú eitt grundarlag at vísa á -

1) Hvussu nógv fæst burturúr sólhita í Føroyum.

Hvussu sól-, vind- og vetnisskipanin kunnu knýtast saman.

2) Hvussu vindur kann gagnnýtast við smáum haldbarum vindmyllum, ið kunnu setast upp á smáplássum og á ali- og smoltststøðum.

3) Hvussu støðug elveiting kann fáast burturúr vindmyllum við at nýta battaríir og vetni at geva streym, tá eingin vindur er.

4) Hvussu vetni kann framleiðast við streymi frá vindmyllum og brúkast sum stabilisator av óstøðugari orku, sum eitt nú vindorku.

5) Bæði sólorkuparturin og vetnisparturin gera Kambsdal til nakað serstakt innan varandi orku. Við 350 fermetrum av sólfangarum er hetta størsta sólorkuskipan í Norðuratlantshavi, og hetta leggur lunnar undir, at fleiri fjarhitaskipanir kunnu gerast við sólhita.

Eyðun Lauritsen vísir á, at Pure Energy Centre hevur ment ein nýggjan vetnisgerara(electrolyzara), ið er hin fyrsti av sínum slagi. Hetta er soleiðis ein prototypa.

Tey hava valt orkudepilin á Kamsdali til at vísa og royndarkoyra hesa tøkni. Umframt hetta er loysnin við sjálvstøðugari el-framleiðslu uttan samband til elnetið serstakt í heimshøpi, so Kambsdalur verður verdur at vitja fyri at síggja og læra um varandi orku.

### Millumtjóða samstarv

Eyðun Lauritsen vísir á, at sólorkuskipanin eisini er grundarlag fyri einum samstarvi við Grønland og Danmark um sólorku.

- NORA fíggjar eina verkætlan, ið skal skjalprógva sólorku í Føroyum og kanna eftir um tann skipanin, vit brúka í Føroyum, eisini er egnað til grønlendsk veðurskifti og veðurlag. Henda verkætlanin hevur soleiðis tilknýti til Sisimiut í Grønlandi og Danmarks Tekniske Universitet í Lyngby.

Hann sigur, at vind- og vetnisparturin eisini er byrjanin til eitt áhaldandi menningarsamstarv við Hetland, har Pure Energy Centre leggur stóra orku í samstarvið. Hetta samstarv fevnir eisini um eina føroyska fyritøku, ið megnar at menna útbúnað, sum kann nýtast um allan heim í sambandi við vetni og varandi orku.

- Hetta samstarv gevur innlit í royndir innan varandi orku á smáplássum og oyggjasamfeløgum. Pure Energy Centre er góðkend útbúgvingar- og granskingardeild innan University of Highlands and Islands í Skotlandi.

Eyðun Lauritsen sigur, at tað er eisini eydnast at fáa ES-pening umvegis Northern Periphery, soleiðis at orkudepilin verður ein av leiðandi pørtunum at byggja upp eina orkuráðgeving kring alt NPP-økið, sum tað verður rópt.

- Orkuráðgevingin skal skipast eftir tí tørvi, sum er í ymsu londunum og ítøkiliga stuðla uppundir, at kommunur, vinnur og einstaklingar fáa varandi orkuskipanir at virka, leggur hann aftrat.

### Menning og ráðgeving

Ein týðandi avbjóðing hjá norðurlondum og londum annars er geva pláss fyri meira vindorku og aðrari varandi orku á el-netinum.

- Orkudepilin á Kambsdali er longu bjóðaður við í norðurlendska verkætlan um júst hetta, har tað, at vetnisskipanin er á staðnum, er sjálvt grundarlagið fyri at koma við. Skipanin er til fyri at verða brúkt í granskingar- og menningarhøpi. Avtala er eisini gjørd við Fróðskaparsetrið og Vinnuháskúlan um, at hesir stovnar í mest møguligan mun verða tiknir við í verkætlanir um gransking og undirvísing.

Eyðun Lauritsen vísir á, at lærdir háskúlar í Finlandi og Norðurírlandi eru komnir við upp í verkætlanina, sum væntandi verður liðug í heyst.

- Tað er soleiðis longu eydnast at gera orkudepilin á Kambsdali til ein depil fyri menning og ráðgeving um varandi orku, sum tað er áhugavert hjá pørtum í øðrum londum at samstarva við. Kambsdalur skal verða ein depil fyri eini líðandi flyting av orkunýtsluni yvir á varandi orku. Vit byrja í tí smáa og vilja røkka málinum í samstarvi við restina av samfelagnum, leggur hann aftrat.

Eyðun Lauritsen ivast onga løtu í, at orkudepilin á Kambsdali verður eitt týðningarmikið amboð til at fremja veðurlagspolitikk í verki, soleiðis at Føroyar fáa ein reinorkubúskap við menning av føroyskum orkuloysnum til føroyska samfelagið.

- Hetta eru loysnir, ið



### FAKTA

**Orkudepil á Kambsdali**

**Fígging:**
Innlendismálaráðið, Fuglafjarðar kommuna, Pure Energy Centre og NORA.
**Verkætlanarleiðari:**
Vilhjálmur Nielsen, sivilverkfrøðingur, ph.d.